# Tarira við Regin Dahl

*Leygardagin 3/11-2018 í Finsen*

*Stutt ummæli – Leif Hansen*

Ein tann mest ambitiøsa konsertskráin, vit leingi hava upplivað í Føroyum. Tarira hevði sett sær fyri, at heiðra Regin Dahl við í høvuðsheitum nýskrivaðum tónleiki. Antin sum útsetingar av løgum hjá Regini ella nýggjum tónleiki til tekstir hjá honum. Umframt hetta framførdi kórið og solistar kendar sangir og kórsatsir til løg hjá 100 ára listamanninum.
Konsertskráin var rúgvusmikil og tí var gott við einum steðgið miðskeiðis. Carl Johan Jensen hugleiddi um skaldið og læs hegnisliga útvaldar yrkingar hjá Regini.
Kórframførslunar vóru tær flestu góðar og ovurfylta Aulan í Finsen fekk til tíðir sera góðan tónleik at hoyra. Kórið var, sum vera man, tryggast í teimum eldru kórsatsunum, hjá t.d. Paula í Sandagerði og Kára Bæk. Tann mest krevjandi satsurin var, sum eg hoyrdi tað, tann hjá Sunleifi Rasmussen. Kórið fer sjálvandi at hava hann á skránni aftur, og fara tá nokk at verða tryggari við hann. Teir nýggju satsinir hjá Paula í Sandagerði, Unn Patursson og Kára Bæk helt gingu væl, kanska eisini tí at teir lógu nærri føroyskum kórtónleiki, sum vit kenna hann seinastu 30 árini, enn tann hjá Sunleifi.
Stephen Wilkinson hevði skrivað ikki færri enn 6 kórsatsir til kórið og fleiri av teimum tókti mær at vera sera góðir. Tað sá eisini út til at kórinum dámdi teir. Vónandi leggjast tit í Tarira ikki á nótanar hjá honum og hinum, soleiðis at vit onnur sum fáast við kórsang eisini kunna fáa gagn og gleði av teimum.
Á einari langari konsert sum hesari var tað eisini gott at vit fingu solo-sang við klaverfylgispæli at hoyra. Kanska serliga nú tað var ein Regin Dahl-konsert. “Tú lýsti” sang Mikael Johan so sera vakurt og beiggjanir Debes fingu tankanir at leita til mangt Ólavsøkuhald seinastu nógvu árini, tá teir við nógvari innliving tulkaðu, Kristin Háberg – “Ein dag í stormi”.
Takk til Jóhannes Andreasen og Tarira fyri at tit gjørdu hesa konsertina. Vónandi taka tit hetta uppaftur – evt við einari lítlari ferð kring landið við tónleikinum – um ikki annað so við parti av konsertskránni.

ps. eg haldi at tað klingaði betri tá gardinunar vóru drignar frá aftan á steðgin.

